# Gamli Smyril sagt endaliga farvæl

**Í gjár fór gamli Smyril av landinum til Karibisku oyggjarnar, har hann skal sigla við ferðafólki og bilum.**

GAMLI SMYRIL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialrin.fo*

Ì gjár endaði eitt tíðarskeið í føroyskari skipasøgu.

Tað hendi, tá ið gamli Smyril sergði endaligafarvæl og fór av landinum.

Smyril 1, sum hann nevndist, hevur ligið í Føroyum í nakrar mánaðir, har nakrar ábøtur eru gjørdar á hann.

Men nú var so loksins klárt at fara. Hann loyst frá landi í gjáramorgunin og stevndi ímóti Havnini, har hann steðgaði á og heilsaði upp á nýggja Smyril fyri síðstu ferð.

Nýggi Smyril skuldi til Suðuroyar klkkan 12.30 í gjár og báðir Smyrlarnir fylgdust so eina løtu suðureftir, áðrenn gamli Smyril setir kós ímóti Karibia, og nýggi Smyril ímóti Tvøroyri.

Gamli Smyril skal framvegis eita Smyrill. Men við tveimum l'um í endanum.

Hann fer nú at sigla við ferðafólki ímillum oyggjar í Karibia.





*Báðir Smyrlarnir fylgdust eina løtu suðureftir áðrenn gali Smyril segði farvæl fyri síðstu ferð og setti leiðina ímóti sínum nýggja heimlandi*

# Nýggja inngongdin letur upp

**Landssjúkrahúsið skipar seinnapartin í dag fyri almennari móttøku, nú nýggja forhøllin á Landssjúkrahúsinum verður tikin í nýtslu**

LANDSSJÚKRAHÚSIÐ
*tíðindaskriv*

Við nýggju forhøllini hevur Landssjúkrahúsið fingið møguleika fyri at bjóða sjúklingum, vitjandi og viðskiftafólki annars nógv betri karmar, tá tey hava ørindi á sjúkrahúsinum. Sjúkrahúsið hervur samstundis fingið eina nýggja høvuðsinngongd, sum er ætlað øllum teimum, ið ikki hava tørv á bráðfeingis hjálp. Inngongdin er væl avmerkt og verður opin millum kl. 7 og 21.

Gongdin innan sjúklingaviðgerð er, at ein alsamt størri partur av viðgerðunum er ambulantur, heldur enn at sjúklingurin verður innlagdur. Hetta setir krøv til, at sjúkrahúsið hevur umstøður at taka ímóti fólki, sum koma úr øllum landinum og mangan mugu ferðast langt. Við nýggju forhøllini hevur Landssjúkrahúsið fingið eitt ljóst, opið og hugnaligt umhvørvi við kafé, har fólk kunnu sita og fáa sær ein drekkamunn ella okkurt til matna, í sambandi við ørindini á sjúkrahúsinum. Úr kaféini er útsýnið avbera gott yvir Nólsoyarfjørðin, og umstøður eru eisini til, at børnini kunnu stytta sær stundir.



*Tað er ein fullkomuliga broytt sjón, sum gongur teimum vitjandi á møti, tá trinið verður inn í nýggju forhøllina*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Sjúklingaskrivstovan, sum m.a. hevur við serviðgerðina uttanlands at gera, og aðrar almennar samskiftisfunktiónir á sjúkrahúsinum, eru nú allar savnaðar við forhøllina, soleiðis at tað verður einfaldari hjá sjúklingum og viðskiftafólki annars at koma í samband við hesar. Eru ivamál, eru tey í móttøkuni altíð klár at leiðbeina.

Meðan samanbyggingin er farin fram, hevur bráðfeingismóttøkan í nýbygninginum í stóran mun verið nýtt sum vanlig inngongd á sjúkrahúsinum. Hetta verður nú broytt, soleiðis at tað einans eru tey, sum hava bráðfeingis tørv á læknahjálp, sum skulu brúka ta inngongdina. Øll onnur skulu brúka nýggju inngongdina.

Almenna móttøkan verður hósdagin 23. februar 2006, kl. 14 - 16, og øll eru vælkomin at hyggja framvið. Nýggja forhøllin verður prýdd við forvitnisligari list, sum Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður, fer at avdúka á móttøkuni.